## Ískoytistryggingar

Afturat bólkatryggingini kanst tú hækka tryggingarupphæddirnar við at tekna persónligar ískoytistryggingar, sum fevna um lívstrygging, bráðsjúkutrygging og óarbeiðsføristrygging.

Í sambandi við ískoytistryggingar, skalt tú svara persónligum heilsuspurningum.

## Pensjónssamansparing

Pensjónssamansparingin verður útgoldin, tá tú hevur rokkið pensjónsaldur.

Spart verður saman á kapitalgrundarlagi. Útgoldið verður sambært Eftirlønarlógini galdandi frá 01.01.2014.

Útgjaldingarhátturin fyri pensjónina er:

Min. 45% Lívrenta
Max 55% Lutapensjón, yvir í minsta lagi 10 ár
Max 15% Kapitalpensjón

Pensjónin verður rentað við marknaðarrentu og er sett í "váðastøði C". Ynskir tú annað váðastøði enn "váðastøði C", skal hetta skrivliga fráboðast Betri Pensjón.

Í sambandi við íløgupartin verður víst til heimasíðuna www.pensjón.fo

## Mín Pensjón

Á heimasíðu okkara www.pensjón.fo kanst tú rita inn á *Mín Pensjón* við Samleikanum, og her hevur tú atgongd til upplýsingar, sum knýta seg til tína tryggingar- og pensjónsavtalu.

Her kanst tú eisini skriva til okkara, um tú ynskir at gera broytingar í tínum viðurskiftum.

Eru spurningar ella ivamál, eru vit at hitta á tlf. 348 700 ella betri@pensjon.fo

betri pensjón



Juli 2024

TRYGGINGAR- & PENSJÓNSSKIPAN

# FYRI LIMIR HJÁ HJÁLPARFÓLKAFELAGNUM

betri pensjón

# Tryggingar- & Pensjónsskipan

Bólkatryggingin er galdandi fyri limir í Hjálparfólkafelagnum, sum eru fyltir 18 ár, men ikki fyltir 67 ár, og sum hava fullan arbeiðsførleika.

**Bólkatryggingin er býtt upp í tveir bólkar:**

**Bólkur 1: Limir, sum hava eitt mánaðarligt inngjald á í minsta lagi kr. 900 eftir skatt.**

| | | | |
|---|---|---|---|
| • **Lívstrygging** | til og við 49 ár | kr. | 700.000 |
| | 50—59 ár | kr. | 600.000 |
| | 60—66 ár | kr. | 500.000 |
| • **Bráðsjúkutrygging** | fram til 67 ár | kr. | 150.000 |
| | børn upp til 18 ár | kr. | 150.000 |
| • **Óarbeiðsføristrygging** | fram til 67 ár við 2/3 óarbeiðsføri | kr. | 36.000 |

**Bólkur 2: limir, sum hava eitt mánaðarligt inngjald, sum er minni enn kr. 900 eftir skatt.**

| | | | |
|---|---|---|---|
| • **Lívstrygging** | til og við 49 ár | kr. | 700.000 |
| | 50—59 ár | kr. | 600.000 |
| | 60—66 ár | kr. | 500.000 |
| • **Bráðsjúkutrygging** | fram til 67 ár | kr. | 150.000 |
| | børn upp til 18 ár | kr. | 150.000 |

## Lívstrygging

Tryggjar teimum eftirsitandi eina upphædd, um tú doyrt áðrenn 67 ára aldur.

Tryggingarupphæddin við deyða verður útgoldin til næsta avvarðandi, um ikki annað er avtalað. Næsti avvarðandi er hjúnafelagi. Er eingin hjúnafelagi, verður goldið út til lívsarvingar. Eru eingir lívsarvingar, verður útgoldið sambært arvalógini.

Er ynski um, at onnur enn omanfyri nevndu fáa tryggingarupphæddina, skal tilskilanarblað útfyllast og latast Betri Pensjón, sí www.pensjón.fo.



## Bráðsjúkutrygging—limur/børn

Fært tú eina av bráðsjúkunum, sum nevndar eru í tryggingartreytunum fyri bráðsjúku, verða útgoldnar kr. 150.000.

Sama upphædd verður útgoldin, um tíni børn - í aldrinum 0 til 18 ár - fáa staðfest eina av bráðsjúkunum, sum nevndar eru fyri børn í tryggingartreytunum fyri bráðsjúku.

Bráðsjúkan skal verða staðfest, áðrenn tú ert fylt/ur 67 ár.

## Óarbeiðsføristrygging

Veitingin verður útgoldin, um óarbeiðsføri rakar í aldrinum fram til fylta 67. ár.

Um arbeiðsførleikin er skerdur við 2/3 ella meira, verður tryggingarveitingin útgoldin aftaná 3 mánaða óarbeiðsføri. Goldið verður mánaðarliga so leingi óarbeiðsføri stendur við, og tú ert á lívi, tó í mesta lagi fram til fylta 67. ár.

Árliga tryggingarveitingin er ásett til **kr. 36.000**, **Óarbeiðsføristryggingin er bert galdandi fyri limir í bólki 1.**

## Innliman

Fyri at fáa hesar tryggingar skal tú vátta limaskapin í Hjálparfólkafelagnum, og at tú hevur fullan arbeiðsførleika. Tá Betri Pensjón hevur móttikið hesa váttan, verða tryggingarnar skrásettar.

Fyrsta inngjaldið ásetur, í hvørjum bólki tú verður tryggjað/ur.

Broytist mánaðarliga inngjaldið, kann Betri Pensjón, eftir áheitan frá tær, broyta bólk, tó skal nýggj arbeiðsførleikaváttan útfyllast.

betri pensjón